

## San Quentin til sølu

Amerikanski staturin Kalifornia er í so stórum fíggjarligum trupulleikum, at hann noyðist at selja fleiri av sínum ognum. Í gjár legði Arnold Schwarzenegger, guvernørur, fram uppskot um at selja tað kenda fongslið San Quentin umframt fleiri aðrar kendar bygningar, sum staturin eigur. Schwarzenegger sigur, at støðan er óvanlig og krevur óvanlig tiltøk. Verður einki gjørt, verður hallið á fíggjarlógini hjá Kalifornia 20 milliardir dollarar næsta ár, sigur hann. Guvernørurin væntar at fáa millum 600 milliónir og eina milliard dollarar fyri San Quentin og hinar almennu bygningarnar. San Quentin, sum er bygt í 1852, gjørdist kent víða av sanginum hjá Johnny Cash, ið hevur sama navn.

## Sterkari marijuana

Fyrr í vikuni frættist úr Bretlandi, at har er minni kokain á marknaðinum enn undanfarin ár, og at hetta uttan iva kemst av teimum nógvu tiltøkunum, sum eru sett í verk fyri at forða rúsevnahandli. Men vandi er í hvørjari vælferð, og nú siga amerikanskir myndugleikar, at har eru misnýtarar farnir at brúka sterkari rúsevni enn fyrr. Talan er serliga um marijuana, sum er vorðið so sterkt sum ongantíð fyrr, skrivar AP. Royndir í statinum Missisippi vísa, at misnýtarar brúka nógv sterkari marijuana enn fyrr, og myndugleikarnir har bera ótta fyri, at hendan gongdin fer at halda fram tey næstu árini.

# siko

av at lata allar skúlar og øll almenn støð aftur, til tess at byrgja fyri at smittan breiddi seg meira enn neyðugt. Tann 6. mai skuldi alt lata uppaftur.

- Eg mátti bara sita inni, alt bleiv stongt. Skúlar, biografar, matstøð, konsertir, og alt annað bleiv stongt. Eg sat bara inni í eina heila viku, og tá hugsaði eg, at um tað skuldi vera soleiðis í longri tíð, so vildi eg heldur bara sleppa heim til Føroya aftur, greiðir Katrin Johannessen frá.





### Helt tað ringasta var av

Tá Katrin hevði sitið inni í eina viku, og tað nærkaðist endanum á karantenuni, ringdi brádliga aftur úr Danmark.

- Henda mikudagin ringdu tey (danska kontórið hjá AFS, blm.) og søgdu: Pakka taskuna og sig farvæl, tí tú skal heim so skjótt vit hava fingið billett til tín. Eg gjørdi sjálvandi sum tey søgdu, og fríggjadagin var eg heima í Føroyum, fortelur Katrin Johannessen.

Katrin greiðir frá, at hon frá fyrsta degi alla tíðina samskifti umvegis meyl og Facebook við høvuðskontórið hjá AFS í Danmark, og at tey høvdu sagt, at tað kundi koma uppá tal at tey máttu heim.

- Eg hevði akkurát fingið inntrykk av at alt var við at vera vanligt aftur, og at tað ikki var so álvarsligt sum tey mettu av fyrstan tíð. Men so brádliga ringdu tey og søgdu at eg skuldi heim, og tá bleiv eg nokkso skuffað, greiðir Katrin frá.

### Evropearar yvirreagerar

Katrin Johannessen greiðir frá, at hetta var henni eitt sindur av einum hvøkki, at hon mátti næstan evakuerast úr landinum, orsaka av svínakríminum.

- Í Meksiko vóru fólk púra rólig. Skúlar og annað vóru stongd, men fólk vóru púra rólig annars, og hvørki tey ella eg vóru serliga bangin. Har greiddu tey frá í fjølmiðlunum, hvussu sjúkan hevði breitt seg, men vóru annars rólig. Men í Evropa reageraðu tey nógv ógvusligari enn tað, og tað var opinbart allastaðni í tíðindunum, sigur Katrin.

Hon greiðir eisini frá, at tey ungu vóru rættiliga rólig um tað heila har. Tá tey fóru út, bóru tey maskur, men skemtaðu annars við at tekna munnar á maskurnar og ymiskt annað, ið ung annars finna uppá.

- Har tóku vit tað als ikki líka álvarsliga sum fólk í Evropa gera. Eg haldi at fólk í Evropa yvirreagera alvorliga uppá hetta við svínakríminum, sigur Katrin Johannessen.

Var tú ongantíð bangin?

- Faktisk ikki. Kanska mest tá eg var millum nógv fólk. Men tað var kanska mest fyri mammusa skyld, at eg royndi at vera eitt sindur forsiktig, tí eg hugsaði, at vissi eg bleiv smittað, so fór eg at blíva innløgd, og so var tað tað. Ikki at eg fór at doyggja ella nakað. Eg visti at í USA og aðrastaðni blivu fólk frísk aftur beinanvegin, greiðir Katrin Johannessen frá.

### Ætlar sær aftur til Meksiko

Nú er Katrin Johannessen heima í Føroyum, og er við at venja seg við eina vanliga føroyska bygdartilveru í Hósvík, har hon nú býr. Men einaferð um ikki so leingi ætlar hon sær yvir aftur til Meksiko.

- Ja heilt sikkurt, eg ætli mær yvir aftur til Meksiko. Eg ætli yvir at siga farvæl við tey, sum eg kenni har. Tað er nokk tað strævnasta við at verða skryktur avstað, tað er at eg ikki fekk møguleika at siga ordiliga farvæl við nakran uttan tey nærmastu. Men Meksiko er eisini eitt so deiligt land. Har er okkurt fyri øll, strendur, ruinir, shopping og so framvegis. Har er øgiliga lekkurt, sigur Katrin Johannessen, sum hóast skuffilsið at verða skrykt úr tilveruni í Meksiko, er ótrúliga fegin um at vera heima aftur í Føroyum.





## Lítið nýtt um svínakrím

**Føroyski pandemibólkurin hevði ikki nógv nýtt at siga um svínakrímið, tá kallað varð inn til tíðindafund í gjárkvøldið**

SVÍNAKRÍM

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Lítið nýtt er undir sólini um útbrotið av svínakrími. Tað kundi føroyski pandemibólkurin staðfesta á tíðindafundi fyri fjølmiðlunum í gjár.

Pandemibólkurin hevði í gjár hugt at støðuni sum kann íkoma tá ella um heimsheilsustovnurin velur at seta tilbúgvingina upp á stig 6, ið er tað hægsta tilbúgvingarstigið, og sum bert kemur upp á tal, tá talan er um eina veruliga heimsfarsótt.

Niðurstøðan av tí var greið, og tað er at Føroyar eru til reiðar at taka móti eini slíkar heimsfarsótt, og at allir partar í tilbúgvingini vita júst hvat teir skulu gera.

Síðan seinasta fundin fyri 14 døgum síðani eru nógvir nýggir tilburðir staðfestir, talið er nú komið upp á millum 5- og 6000 tilburðir, og teir allarflestu eru nú í USA. Tó eru fá fleiri fólk deyð, og í Meksiko verður boðað frá at smittan er hæsað av.

### Fýra møguleikar

Høgni Debes Joensen kundi tó gita sær til fýra møguleikar, um hvat mest líkt fer at henda.

- Ein er at tað kann hugsast at H1N1 virusið bara doyr út. Tað kann eisini hugsast, at tað kann minka á okkara leiðum, nú tá sólin er komin framm. Tað kann eisini minka nú og koma fram aftur í heyst – tó til ta tíð vænti eg at ein koppseting er klár. Seinasti møguleikin er at WHO avblæsur øll stigini og klassar tað sum eina vanliga influensa, um virusið er viknað, greiðir Høgni Debes Joensen frá.